# Børn hava tørv á flokkum

**Skúlabørn menna seg positivt, tá tey hoyra til ein ávísan flokk, eisini hóast tað eru ósemjur í flokkinum. Tað vísir ein stór nýggj kanning, sum Magtudredningen hevur gjørt. Kanningin verður almannakunngjørd í dag**

SKÚLI OG MENNING
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tann óbundna undirvísingin við bólkarbeiði og evnisvikum er ein undirvísingarháttur, sum er komin í fólkaskúlan fyri at verða.

– Men vit eiga at ansa eftir, at skúlin ikki gerst eitt stórt sjálvtøkuborð, har næmingurin bara skiftir uppgávuna út við eitthvørt annað, bara hon keðir seg ella fær mótstøðu.

At hoyra til ein ávísan flokk og bólk er neyðugt, fyri at børnini kunnu mennast og gerast sosial, ábyrgdarfull og mótstøðufør menniskju. Ikki minst, tá tað eru ósemjur og trupulleikar í flokkinum, sum tey læra at vinna á saman.

Hesa niðurstøðu kom ein bólkur av granskarum til í eini nýggjari stórari kanning, sum tey kalla, "Den vordende demokrat — en undersøgelse af skoleklassen som demokratisk lærested". Kanningin verður almannakunngjørd í dag.

Leiðarin av granskarabólkinum, professor Bo Jacobsen ved Københavns Universitet og Amternes og Kommunernes Forskningsinstitut, ávarar harðliga ímóti gongdini á fleiri donskum fólkaskúlum, har fleksiblir undirvísingarhættir verða skiftir út við floksundirvísingina.

– Flokkurin hevur avgerandi týdning fyri persónligu menningina hjá næminginum og innlæringina av teimum demokratisku normunum, tí er orsøk at ávara ímóti syndring av skúlaflokkinum, sigur professarin.

*Kelda: Politikken*

# G!-sølan byrjaði væl

Eftir bert einari viku hava útvið 400 fólk ognað sær vikuskiftispass til G! Festivalin 2004. Hetta er tríggjar ferðir fleiri, enn selt var tilsamans í forsølu í fjør.

G! fyrireikararnir hava gjørt rættiliga fitt burtur úr at gera tiltakið sjónligt kring landið við lýsingarherferðum og tónleikatiltøkum m.a. á Torginum í SMS og á Torginum í Runavík. Og niðurstøðan má verða, at tað riggar at gera eitt sindur burturúr. Tað hava G! Festival fyrireikararnir sannað eftir at fyrsta vikan við serliga upplatingartilboðnum til atgongumerki er farin afturum.

Eftir einari viku hava nevniliga útvið 400 fólk ognað sær vikuskiftispass til G! Festival 2004. Ella sagt á annan hátt, 400 fólk hava sett sær vikuskiftið 16. og 17. Juli av til at fara á tað fyrireikararnir sjálvir kalla "Føroya størsta og feitasta tónleikatiltak".

Verður hetta sæð í mun til í fjør, tá seld vóru tilsamans 125 atgongumerki í forsølu, og í 2002 tá eingin forsøla var til G! Festival yvirhøvur, sæst veruliga ein gongd við vaksandi áhuga fyri- og til fyrimuns fyri G! Festivalin.

Hóast upplatingar-tilboðið ikki er galdandi eftir 8. mai, eru framvegis pengar at spara við at keypa í góðari tíð. Forsøluprísir eru nevniliga galdandi fram til 1. juli.

**-pop.fo**

# Mathea Hilduberg sett sum leiðari á Listasavni Føroya

**Frá 1. juli at rokna er Mathea Hilduberg í Havn sett sum nýggjur leiðari á Listasavni Føroya. Mathea er 40 ára gomul og útbúgvin cand. merc. við sergrein í marknaðarføring**

Hon hevur fyrr arbeitt við eini verkætlan fyri listasavnið, har hon hevur skrásett málningar sum eru landsins ogn.

10 umsóknir vóru til starvið, harav 7 vóru føroyingar. Starvið er áramálssett til fimm ár.



*Mathea Hilduberg er sett sum nýggjur leiðari á Listasavni Føroya. Saman við stýrinum í fer hon at leggja ætlanir um framtíðina hjá stovninum*
*Mynd: Jens KristianVang*

# »Luftballónin« vitjar í Føroyum

**Tilboð og hjálpitól til teirra, ið stríðast við astma og allergi eru á skránni, tá Ole Møller Nielsen fer at halda fyrilestrar í komandi viku**

FYRILESTUR
*tíðindaskriv*

Í døgunum 18. og 19. mai hevur Astma & Allergifelagið vitjan av Ole Møller Hansen, frá danska felagsskapinum »Luftballonen«. Á framsýningum og fyrilestrum í Havn og í Klaksvík fer hann at greiða frá hvørji tilboð og hjálpartól finnast til teirra, ið eru fongd við astma og allergi. Fyrilestrarnir verða hildnir á ávíkavist Sjúkrahúsinum í Klaksvík og á Landssjúkrahúsinum.

Umframt at Ole Møller Hansen fer at greiða frá um summarlegutilboð til ung við Astma, sum felagið fyriskipar í Danmark og í Hollandi, so umboðar hann eisini fyritøkuna MvG Consult í Odense, ið er ráðgevandi innan luftviðurskifti og umhvørvi. Og hann fer so eisini at greiða frá, hvønn týdning fuktur, dust, teppir, pollen v.m. hava fyri tilveruna hjá teimum, sum eru fongd við astma og/ella ovurviðkvæmi.



*Ole Møller Nielsen fer millum annað at greiða frá teimum ytru ávirkanum, sum kunnu gera tilveruna trupla hjá astma- og allergiraktum*

Framsýningarnar og kunnandi fundirnir eru almennir, og verða sum nevnt hildnir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin 18. mai, og á Landsjúkrahúsinum mikudagin 19. mai. Kl. 16.00 er heitið: Mytir og fakta um inniklima, og kl. 19.00 verður greitt frá summarskeiðum fyri børn og ung við astma. Heitið er: Ein øðrvísi summarfrítíð fyri teg, ið hevur astma.

Fyrireikararnir handan tiltakið eru Astma & Allergifelagið í Føroyum, felagið Luftballonen og ráðgevandi verkfrøðingafelagið MvG Consult.




HVØNN VEG SKAL EG FARA?
Byrja yrkisleiðina í Sparikassanum. Júst nú sóknast Sparikassin eftir næmingum.
www.sparikassin.fo
FØROYA SPARIKASSI




# Ferðist í Føroyum

**Ferðaráð Føroya letur í dag upp framsýning í SMS, sum hevur til endamáls at fáa føroyingar at halda sína summarferiu í Føroyum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Tað er ov lítið, at bara útlendingar halda frí í Føroyum. Tað eiga føroyingar sjálvir eisini at gera, heldur Ferðaráð Føroya.

Sum eina mótvekt móti teimum ferðamessum, sum vanliga bjóða út ferðir uttanlands, hevur Ferðaráð Føroya í nøkur ár smaan við SMS havt eina messu á Torginum í SMS, har dentur verður lagdur á at siga fólki frá øllum teimum møguleikum, sum eru fyri ferðing í Føroyum.

Hendan árliga afturvendandi messan letur upp í SMS í dag klokkan 10.00.

Í hesum sambandi hevur Ferðaráðið givið út ein faldara, sum vísir á nakrar av møguleikunum, vit í okkara egna landi eiga at vísa ferðamanninum. Faldarin er ætlaður føroyingum og er skrivaður á føroyskum.

Hetta er annað árið, ein slíkur faldari verður givin út, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya. Faldarin, sum givin varð út í fjør, fekk góð ummæli, og tað sama hevur hesin eisini fingið, hóast hann júst er komin ut millum fólk, sigur hann.

Stjórin á Ferðaráðnum sigur, at tað tykist nógv léttari at fyrireika og selja ferðir uttanlands, hóast tað, at ferðing í Føroyum mangan er bíligari og í ongum førum verri upplivilsi, enn at ferðast aðrastaðni.

Takið er at fáa føroyingar at síggja teir møguleikar, vit hava. Og teir eru nógvir.

Hóast vit ikki hava lýggjar, hvítar sandstrendur við brennandi sól og andandi loti (viðhvørt) innan av havinum, har fólk liggja á einum handklæði ella í einum liggistóli og blunda, meðan sólin snerkir búkskinnið, so hava vit so øgiliga nógv annað, sum onnur ikki hava. Og tá nú fremmandafólk vilja gjalda nógvan pening fyri at koma higar at síggja hetta, vit eiga at bjóða teimum, er tað ikki meira enn rímiligt, at tað eisini verður boðið føroyingum, heldur ferðavinnustjórin.

Heri Niclasen sigur, at ferðavinnan letur ikki verri at í ár enn í fjør. serliga hugsar hann um gistingarhúsini, sum siga frá umleið somu undirtøku, sum í fjør. Men í fjør var ein lítil afturgongd í mun til í fyrraárið, sigur Heri Niclasen.

Hann fegnast um, at møguleikarnir fyri gisting eisini økjast í Føroyum. Eitt gistingarhús er latið upp í Havn, og eitt er ávegis á Tvøroyri eisini, vísir hann á.



*Nógvir góðir møguleikar eru fyri gongutúrum í Føroyum. Náttúran stendur ikki aftan fyri tað, onnur lond hava at bjóða*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Føroyingar í Morgunblaðnum

**Tímarit Morgunblaðsins, ið er mentanarblað Morginsblaðsins sunnudag, hevði sunnudagin 3 síður við og um føroyingar í Íslandi. Eini 300 føroyingar, føddir í Føroyum, búgva í Íslandi nú, verður mett. Millum kendu nøvnini í blaðnum eru Eivør Pálsdóttir og Julian Johnsson**

ÚTISETAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eykablað Morgunsblaðsins sunnudag hevði heilar 3 síður um føroyingar í blaðnum sunnudagin. Forsíðumyndin er av Eivør Pálsdóttir og Julian Johnsson og er yvirskriftin; Føroyskir frændur - Eivør Pálsdóttir og Julian Johnsson hava fest nøvn síni í huga landsmanna.

Síðarunar í blaðnum hava yvirskriftina, sum boðar frá, at "Føroyingarnir koma".

Fyrsta grein er samrøða við føroyska tannlæknan Elin Svarrer Wang, sum eisini er forkvinna í føroyingafelagnum í Íslandi. Hon sigur, at 260 limir eru í felagnum og teir flestu eru føddir í Føroyum, men eisini eru nakrir "hálvir føroyingar". Mett verður, at eini 300 fólk, fødd í Føroyum, búgva í Íslandi nú.



Síðani er grein um "Vælkend andlit". Bæði tey sum nú búgva í Íslandi og nøkur teirra, sum hava verið har, verða nevnd. Greinin er um sangkvinnuna Eivør og fótbóltsleikaran Julian. Eisini verða nevnd Jens Martin Knudsen, Marentza Poulsen, Sylvia Lockey Gunnarstein, James Olsen, handilsmaðurin Jákup Olsen og Erns Olsen frá Domino's Pizza lýsingunum.

Tvær síður eru við práti við Eivør og Julian og um tey. Eivør sigur m.a. í greinini, at orsøkin til undanvindin á sangleiðini í Íslandi er, at hon hevur nýtt føroysku røturnar í tónleikinum og at hon hevur verið trúgv mótvegis tí, at hon er føroyingur.